Tematýsdagur:

Tintin hin einastandandi reportarin

Á DR2 týskvøldið 10. mai kl. 19.30

Skráin fyri temakvøldið:

19.30 Tintin – hin einastandandi reportarin
19.35 Tintin – fyri ein og hvønn prís
19.50 Ein filmur verður gjørdur
19.55 Tintin og eg
21.10 Tintin í Danmark
21.25 Arvurin eftir Tintin

Hergé, hvørs kristna navn er Georges Remi, skapti hetjuna Tintin. Fyrsti partur varð prentaður 10. januar í 1929 við heitinum "Tintin í Sovjet"

Í fjør fylti Tintin 75 ár. Tað var tann 16. september, og tá sendi Dr2 nakrar sendingar, ið lýstu fyribrigdið Tintin – hetjan úr teknirøðini við sama heiti. Men Tintin er enn sera væl umtóktur, og Dr2 endursendir hesar sendingarnar. Vit hitta bæði høvuðspersónin Tintin, fjepparar hansara og skapara hansara – belgiumaðurin Hergé. Í dokumentarfilminum "Tintin og eg", ið er á skránni kl. 19.55, hitta vit tann smædna Hergé. Filmurin er grundaður á rød av samrøðum við Hergé. Í 1971 fekk Hergé vitjan av einum ungum lesandi, sum fekk eitt serligt innlit í hugaheimin hjá skaparanum av Tintin. Hesar samrøðurnar vórðu kortini styttar nógv, áðrenn tær vóru útgivnar, og síðan goymdar fyri almenninginum í einum serligum skjalasavni. Men so fekk ungi danski blaðmaðurin Anders Østergaard loyvi at gera brúk av Tintinskjalagoymsluna í Belgien. Rødd Hergés verður brúkt í "Tintin og eg", samstundis síggja vit ógloymandi løtur av ferðum Tintins, m.a. til tað gátufullu stjørnuna, Tibet og Kongo, heimsins nalva... Filmurin er ein sjálvævisøgulig frásøgn um lív Hergés og framúrskarandi lívsverk hansara.

Í dokumentarfilminum "Tintin og eg" hitta vit tann smædna Hergé – faðirin at Tintin

Heimurin sambært Garp

Á Kanal 5 sunnukvøldið 8. mai kl. 22.25

Ungi Garp (Robin Williams) hevur bæði áræði og sterkan lívsvilja

Hvørja ferð Garp spyr, hvør pápi hansara er, so sigur Jenny honum søguna um tann illa sáraða hermannin, ið lá uttan vit og til at doyggja

Garp er sonur ógiftu sjúkrasystrina Jenny Fields, sum er sera íðin í kvinnurørslini. Hvørja ferð hann spyr, hvør pápi hansara er, sum hann ongantíð hevur hitt, so sigur Jenny honum søguna um tann illa sáraða hermannin, ið lá uttan vit og til at doyggja. Jenny var saman við hesum hermanni og tað einasti hesin sáraði hermaðurin fekk sagt var "garp!". Stutt eftir hetta doyði hermaðurin, og Jenny uppkallaði sonin hon átti eftir hermanninum. Garp er eisini tað einasta kallkynið, ið Jenny er góð við. Hon hevur ein heldur óvanligan hugburð mótvegis kynslívinum. Jenny hugsar nevniliga mest um kvinnurnar – sínar medsystrar. Hennara sterka samkensla við kúgaðum kvinnum fær hana at savna ein flokk av slíkum kvinnum um seg. Hesin flokkurin hevur set sær fyri at stríðast ímóti mannsvaldinum í heiminum. Undir tílíkum umstøðum veksur Garp upp og verður til ein sera forvitnan ungan mann, ið giftir seg við lestrarvininum Helen og tey fáa tveir fittar synir. Garp hevur ein sterkan lívsvilja og áræði, men tó ikki sama stríðsvilja sum mamman, ið hevur nógv um at vera – hóast hetta, so er hann góður við hana. Men, tá tað stendur nógv á, so er tað ikki mammuna hann vendir sær til, men Roberta, høgra hondin hjá mammuni. Roberta er transvestittur, og tað er einki sum er henni fremmant. Hon skilir vilstar sálir. Og Garp fær sanniliga brúk fyri Robertu, tí lagnan vil honum tað ikki altíð so væl. Hesin stundum skemtiligi dramafilmurin frá 1982 bleiv m.a. heiðraður við eini oskarvirðisløn, og hann er grundaður á skaldsøguna eftir John Irving við sama heiti.

Heimurin sambært Garp

Við - Garp: Robin Williams. Jenny: Glenn Close. Helen: Mary Beth Hurt. Roberta: John Lithgow. Mrs. Fields: Jessica Tandy.
Leikstjórn: George Roy Hill
Upprunaheiti: The World According to Garp
Grundaður á skaldsøgu eftir John Irving